


www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 12 - 2011

# Iran hóttir við at steingja týðandi oljuleið

Iran hóttir nú við einum sera álvarssomum svari, um Vesturheimurin samtykkir tiltøk sum skulu skerja landsins møguleikar at útflyta sína olju. - Verða tiltøk sett í verk ímóti iranskari olju, fara vit at tryggja, at ikki so mikið sum ein dropi av olju sleppur ígjøgnum Hormuzsundið, sigur iranski varaforsetin, Mohammad Reza Rahimi, við almennu tíðindastovuna Irna. Eygleiðarar vísa á, at hóttanin kemur, júst sum iranski herflotin hevur eina stóra venjing har á leiðini. Varaforsetin sigur, at Iran er fyri friði, men at tiltøk ímóti landsins oljuútflutningi eru eitt so álvarssamt stig, at tað fer at krevja eitt hóskandi svar. Umleið ein triðingur av allari olju, sum verður flutt við tangaskipi, fer ígjøgnum Hormuzsundið, og skip hjá amerikanska herflotanum eru støðugt á varðhaldi har fyri at tryggja, at skip sleppa at sigla ígjøgnum sundið. ES hevur ein langan svartalista við einstaklingum og fyritøkum í Iran, sum samveldið hevur sett tiltøk ímóti. Málið er at noyða stýrið í Teheran at loyva altjóða eftirlitsmonnum at kanna landsins kjarnorkuútbúnað. Kreftir í ES vilja hava enn strangari tiltøk ímóti Iran, men londini eru ikki samd, og ósemjan er serliga týðilig, tá tað snýr seg um tiltøk ímóti iransku oljuvinnuni.